# Góð ráð til vetrarkoyring

**Veturin fer ofta illa við bilunum. Vegirnir eru mangan so skitnir, at um man koyrir ein túr við einum nývaskaðum bili, verður hann mangan so køstaskitin eftir eini løtu.**

**Eisini kavin og frostið teka hart upp á mekanisku lutirnar. Við umhugsni ber tó til at verja seg, soleiðis at sleppast kann undan óvæntaðum trupulleikum og dýrum umvælingum.**

**Her nøkur góð ráð fyri at umgangast nógvar av hesum trupulleikum.**

**Neyðugt er at syrgja fyri frostvesku og sprinklaravesku, at hava tey røttu dekkini, røttu ljósføringina, kanna um akkumulatorin er góður nokk og at polera og bona bilin til veturin.**



## Koyrið við fullum oljutanga

Hetta er bert galdandi fyri dieselbilar. Um tangin er fullur slepst undan kondensvatni í tanganum, sum gevur trupuleikar við motorgongdini.

Eisini er umráðandi at tappa vatnið av dieseloljufiltrinum. Filtrini hava ein stuss til at tappa vatnið av við.

## Smyrjið hurðalásini

Tað er umráðandi at hurðlásini eru væl smurd um veturin, bæði lásini inni í hurðunum og sjálvur lásasynindarin.

## Smyrjið gummilistarnar

Í frosti er vandi fyri at gummilistarnir innan fyri hurðarnar frysta fastir, tá hurðin verður latin upp við tí úrsliti, at teir kunnu skrædna.




## Loysið viskararnar í kulda og frosti

Minnist til at taka viskararnar út frá rútinum tá tað frystur um næturnar. Tað hendir seg ofta, at bilar verða settir í gongd, meðan viskarnir eru frystir fastir í rútin við tí úrsliti, at viskaramotorarnir brenna yvir, ella viskaramekanismurnar taka skaða.





*Positiva gongdin viðvíkjandi ferðsluvanlukkum í Føroyum seinastu árini hevur borið við sær, at nú eru Føroyar komnar ájavnt við Danmark, og eru annars í hølunum á Noregi og Svøríki, sum, saman við Bretlandi, hava frægastu ferðsluviðurskifti í heiminum, nevnliga 6-7 deyð fyri hvørji 100.000 fólk*

# 248 fólk deyð í 76 ár

**Talið á deyðum í ferðsluni er nógv minkað seinastu árini. Føroyar eru nú komna ájavnt við Danmark og í hølunum á Noreg og Svøríki sum saman við Bretlandi hava frægastu ferðsluviðurskifti í heiminum**

FERÐSLUTRYGD

Tað eru 82 ár liðin síðan fyrsti bilurin kom til Føroya. Fyrsta ferðsluvanlukkan, ið kravdi mannalív, hendi í 1928, og higartil hava 248 fólk látið lív í ferðsluni her á landi.

Hildið verður álítandi, at fyri hvønn tann, sum doyr í ferðsluni, verða 25 fólk skadd, og av teimum fáa 10% varandi mein. Samsvarandi hesum hava tí o.u. 6200 fólk fingið skaða í ferðsluni, og av teimum hava 620 fingið varandi mein.

Í 1950 - 1960-árunum doyðu 4-5 fólk í miðal um árið í Føroyum fyri hvørji 100.000 fólk.

Í árunum 1970 - 1979 veksur hetta talið til 13, frá 1980 - 1989 til 20, og í árunum 1990 - 2001 minkar tað so niður í 10 deyð fyri hvørji 100.000 fólk.

Seinnapartin í 80-árunum, tá ið ringast stóð til, doyðu 23 fólk fyri hvørji 100.000 fólk í ferðsluni í Føroyum.

Sammett við onnur lond, vóru Føroyar tá millum tey ringast staddu lond í Evropa á hesum øki, tí bara Portugal og Grikkaland høvdu hægri tøl, enn vit tá høvdu.

Í 90-árunum lækkaði talið niður um helvtina, og tey seinastu fýra árini er miðaltalið farið niður um 4 deyð um árið ella 6,9 fyri hvørji 100.000.

Henda positiva gongd hevur borið við sær, at nú eru Føroyar komnar ájavnt við Danmark, og eru annars í hølunum á Noregi og Svøríki, sum, saman við Bretlandi, hava frægastu ferðsluviðurskifti í heiminum, nevnliga 6-7 deyð fyri hvørji 100.000 fólk.

*Kelda: »Ávegis til Nullhugsjónina«*
*Ferðslutrygd*

# Ferðslutrygd mælir til djúpari slitbana á vetrardekkum

FERÐSLUTRYGD

Í vár var, við Fríðriki Bláhamar á odda, skipað fyri átaki, sum hevði til endamáls at fáa myndugleikarnar at áseta reglur um, at minstamarkið á slitbananum fyri vetrardekk eigur at vera 3 mm, eins og tað er í londunum á okkara breiddarstigi.

Av Ferðslutrygd siga tey, at hetta er væl í tráð við áskoðaninar, sum koma fram í álitinum um Nullhugsjónina í kap 30.3:

***30.3 Bremsur og dekk***

*...Mynstrini í dekkunum eiga í minsta lagi at vera 3 mm djúp til tess at minka um vandan at glíða, tá ið nógv væta er á vegnum.*

*Nýt píka- ella heilársdekk í hálku. Eitt summardekk verður bæði hart og hált í frosti; men heilársdekkini verða verandi mjúk í frostveðri.*



Í Svøríki er ásett við lóg, at vetrardekk skulu verða nýtt frá 1. desember til 31. mars, og at píkadekk kunnu verða nýtt til 30. apríl.

*Kelda: Ferðslutrygd*
*www.ferdslutrygd.fo*

## 166 mió í yvirskoti av ferðslu

FERÐSLA

Í 2001 kostaði tað almennu Føroyum 243 milliónir krónur at dríva ferðsluna í landinum. Men samstundis hevði tað almenna 166 mió. kr í yvirskoti av ferðsluni, tí hon gevur so nógvar inntøkur í A-skatti, MVG og øðrum avgjøldum. Í 2001 vóru hesar inntøkur 409 milliónir kr.

Verður hugt at ferðsluvanlukkunum fyri seg, kostaðu tær føroyska samfelagnum í 2001 slakar 200 milliónir kr.

Til sammetingar kann nevnast, at sama ár vóru 40 millónir kr. nýttar beinleiðis at gera ferðslutrygdarábøtur á vegirnar, ella minni enn 10% av inntøkunum, sum samfelagið hevur av ferðsluni.

*Kelda: »Ávegis til Nullhugsjónina« Ferðslutrygd*

## FAKTA
### um teknisku menningina á trygdarøkinum

50 árini: Tilvitanin vaknar, um at ferðsluvanlukkur kosta samfelagnum nógv.

Byrjað verður at arbeiða við at gera bilar tryggari. (Bilbeltið verður uppfunnið, byrjað verður við at broyta skapið á bilinum, soleiðis at sum minst skaði hendir)

60 árini: Lóg um bilbelti í nøkrum londum

70 árini: lóg um bilbelti í flestu londum

80 árini: lóg um bilbelti í Føroyum

80-90 árini: ABS bremsur og Airbag koma í bilarnar. Bilarnir verða sterkari gjørdir rundan um kabinuna, har fólk situr, og »bleytari« har hann skal taka av fyri stoyti.

Nú: Mekaniskar og serliga elektroniskar trygdarskipanir verða alsamt mentar.

Framtíðin: Bilurin verður meira og meira skynsamur »intelligentur«.

*Kelda: Ferðslutrygd*